# Uppskot til rammusáttmála

## Viðvíkjandi veiting av røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum

millum

Almannaverkið
Staravegur 18
100 Tórshavn
Føroyar

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
160 Argir
Føroyar

og

Sp/f Bilrøkt
Stiðjagøta 3
100 Tórshavn
Føroyar
eftir hetta "Veitarin"

GJALDSTOVAN

# Innihald


1. Grundarlag ..... 3
2. Orðagreining ..... 3
3. Vavi ..... 3
4. Heimild ..... 4
5. Innkeyp ..... 4
6. Samstarv ..... 5
7. Broytingar í prísum ..... 6
8. Broytingar í sáttmálanum ..... 6
9. Uppsøgn og mishald ..... 7
   a . Uppsøgn ..... 7
   b. Mishald ..... 7
10. Force Majeure ..... 7
11. Avhenda til triðja part ..... 8
12. Trúnaður ..... 8
13. Endurgjald ..... 8
14. Træta ..... 9
15. Longd av sáttmála og lokadagur ..... 9
16. Undirskrift av sáttmála ..... 10

# 1. Grundarlag

Til henda rammusáttmála eru hesi fylgiskjøl:

- Fylgiskjal A: Kravfesting
- Fylgiskjal B: Veitarans tilboð
- Fylgiskjal C: Veitarans prísir
- Fylgiskjal D: Yvirlit yvir akfør hjá Almannaverkinum

# 2. Orðagreining

Við "arbeiðsdag" verður sipað til gerandisdagar frá kl. 8:00 - 16:00.

Við "keypara" verður sipað til Almannaverkið og aðrar stovnar, ið hava rættin til at keypa inn eftir hesum sáttmála. Við "aðrar stovnar" verður sipað til aðrar stovnar hjá landinum, ið sjálvbodnir kunnu brúka sáttmálan.

Við "sáttmála" verður sipað til henda rammusáttmála við øllum tilhoyrandi fylgiskjølum og eftirfylgjandi ískoytum til henda sáttmála.

Við "partar" verður sipað til keyparan og veitaran, í felag "partarnir".

Við "veiting" verður sipað til tær vørur og tænastur, sum eru lýstar í fylgiskjølunum A og B.

# 3. Vavi

Sáttmálin fevnir um røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum, sum lýst í fylgiskjølunum A og B.

Rættin til at keypa inn eftir hesum sáttmála hava øll, ið eru bundin av rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.

Keyparin er ikki bundin av at keypa eina ávísa mongd av vørum og tænastum.

Sáttmálin verður undirskrivaður av Gjaldstovuni og Almannaverkinum vegna keypara.

## 4. Heimild

Almannaverkið bindur seg til bert at keypa vørur og tænastur, fevndar av hesum sáttmála, frá veitara í tí tíðarskeiði, sáttmálin er galdandi.

Almannaverkið hevur 79 akfør, ið eru staðbundin í Suðurstreymoy, og sum eru fevnd av sáttmálanum. Almannaverkið hevur 51 akfør, sum eru staðbundin uttanfyri Suðurstreymoy, sum sjálvboðið kunnu brúka sáttmálan. Aðrir stovnar hava 102 akfør, sum kunnu brúka sáttmálan sjálvboðið.

## 5. Innkeyp

Keyparin kann keypa vørur og tænastur við at bíleggja frá veitaranum. Bílegging kann gerast antin við at senda teldupost ella ringja til veitarin á:

Teldupostadressa: hogni@bilrokt.fo
Telefonnummar: +298 235887

Partarnir avtala dagfesting og tíð til akfør, ið skulu á verkstað. Tænastan skal veitast uttan ógrundaðan steðg eftir avtalaðu tíðina fyri tænastuna. Veitarin skal skipa fyri koyring til og

frá verkstaði fyri akfør, sum eru staðbundin í Tórshavn. Við Tórshavn verður sipað til økið innan fyri Norðasta Horn og Sandvíkahjalla.

Veitarin kann loyva keypara at bíleggja umvegis elektroniska skipan, um veitarin hevur eina slíka skipan.

Ein fylgiseðil skal heftast við hvørjum ordra, ið inniheldur:

- Navn á veitara
- Navn og nummar á stovni
- Adressa hjá stovni
- Navn og nummar á vøru
- Nummar á rokning
- Linjunummar á rokning
- Tal av vørum
- Prísur við og uttan MVG
- Dagfesting fyri bílegging

Allar rokningar til stovnar skulu vera í formatinum OIO-UBL við tilvísing til nummar á sáttmála og stovni.

Rokningar fella til gjaldingar 30 dagar eftir faktura dagfesting.

*Veitarin megnar í løtuni ikki at liva upp til krav um navn og nr. á rammusáttmála. Veitarin fær eina nýggja skipan í januar 2023, sum møguliga hevur hesa loysn. Vit taka hetta uppaftur, tá ið skipanin er komin til høldar.*

## 6. Samstarv

Veitarin skal áseta samskiftispersón, ið hevur ábyrgd av hesum sáttmála.

Veitarin og ábyrgdarin skulu tryggja, at øll starvsfólk kenna sáttmálan.
Ábyrgdarin skal hava fulltrú til at taka avgerðir vegna veitaran.

Veitarin skal senda eina skrivliga frágreiðing til Almannaverkið innan 5 yrkadagar, um veitarin fær kærur frá brúkarum, ið hava rætt at keypa inn eftir hesum sáttmála.

Partarnir eru samdir um at samstarva á skikkaðan hátt og yvirhalda ásetingarnar í hesum sáttmála. Broyttar fyritreytir, sum hava við sær, at annar parturin ikki kann halda sín part av avtalunum, skulu boðast hinum partinum frá sum skjótast.

## 7. Broytingar í prísum

Broytingar í prísum kann bert fara fram eftir samráð millum partarnar, og skal góðtakast av Gjaldstovuni og Almannaverkinum. Veitarin skal sostatt, altíð seta seg í samband við Gjaldstovuna og Almannaverkið, um veitarin ætlar at broyta prísirnar. Hetta er eisini galdandi fyri broytingar av øðrum gjøldum, sum veitarin onga ávirkan hevur á.

## 8. Broytingar í sáttmálanum

Allar broytingar til sáttmálan skulu boðast frá innan eina hóskandi freist. Broytingar verða framdar við einum ískoyti til sáttmálan.

Broytingar viðvíkjandi samskiftisupplýsingum hjá veitara (adressur, teldupostadressur, telefonnummur, samskiftispersónar) og annars týðiligar villur í hesum sáttmála, fylgiskjølum v.m., sum til dømis skeivar tilvísingar, kunnu Gjaldstovan og Almannaverkið broyta uttan góðkenning frá veitara.

## 9. Uppsøgn og mishald

### a. Uppsøgn

Keyparin kann siga henda sáttmála upp við at senda skrivliga fráboðan við eini freist uppá 3 mánaðir seinast í einum mánaði.

Veitarin kann siga henda sáttmála upp við at senda skrivliga fráboðan við eini freist uppá 12 mánaðir seinast í einum mánaði.

### b. Mishald

Um komandi veitarin ikki er mentur at liva upp til minstukrøv í Fylgiskjal A og krøvini í sáttmálanum í ásettu gildistíð, verður hetta mett sum mishald, ið heimilar keyparanum at siga upp sáttmálan.

## 10. Force Majeure

Partarnir kunnu ikki ábyrgdast fyri mishald orsakað av force majeure.

Force majeure verður lýst sum ein hending, sum partarnir ikki hava tamarhald á, og tí ikki hava møguleika at lúka treytirnar í sáttmálanum vegna kríggj, náttúruvanlukku, verkfall, alheimsfarsótt v.m.

Partarnir hava skyldu at manna tilbúgving um neyðugt.

Partarnir bera sjálvir sínar útreiðslur orsakað av force majeure.

## 11. Avhenda til triðja part

Partarnir kunnu ikki avhenda nakrar av sínum skyldum sambært sáttmálanum til triðja part uttan skrivliga góðkenning frá hinum partinum.

Almannaverkið treytar sær rættin til at nokta avhending til triðja part. Hetta sjálvt um triði partur kann liva upp til treytirnar í sáttmálanum og útboðstilfarinum.

## 12. Trúnaður

Gjaldstovan og Almannaverkið eru fevnd av løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina.

Partarnir hava tagnarskyldu um viðurskifti, sum partarnir fáa innlit í hjá hvørjum øðrum umvegis samstarvið eftir hesum sáttmála.

Tagnarskyldan heldur fram eftir, at sáttmálin er farin úr gildi.

## 13. Endurgjald

Partarnir hava endurgjaldsábyrgd sambært føroyskari lóggávu.

Um Gjaldstovan og Almannaverkið siga sáttmálan upp vegna mishald, so skal veitarin gjalda endurgjald, sum svarar til útreiðslurnar, sum landið og stovnar hava av hesum.

Gjaldstovan og Almannaverkið átaka sær onga ábyrgd fyri stovnar, sum sjálvbodnir brúka sáttmálan.

Gjaldstovan og Almannaverkið hava onga ábyrgd yvir fyri triðja parti viðvíkjandi sáttmálum, ið Gjaldstovan og Almannaverkið ikki vara av. Veitarin hevur sjálvur ábyrgd yvir fyri sínum undirveitarum.

Um komandi veitarin til henda sáttmálan er ein handilsfelagsskapur, skal hesin hava samábyrgd.

## 14. Træta

Træta skal, um møguligt, loysast partarnar í millum við samráðingum.

Træta skal loysast við dómstólarnar, um partarnir ikki kunnu loysa trætu við samráðingum.

## 15. Longd av sáttmála og lokadagur

Sáttmálin kemur í gildi sama dag, sáttmálin er undirskrivaður. Sáttmálin fer úr gildi uttan fráboðan 3 ár eftir dagin, sáttmálin varð undirskrivaður.

## 16. Undirskrift av sáttmála

Sáttmálin verður latin úr hondum í trimum eintøkum, sum øll skulu skrivast undir av øllum trimum pørtunum.

Við at skriva undir sáttmálan tryggja partarnir, at persónarnir, sum skriva undir sáttmálan, hava fulltrú til at binda partin, hvørs vegna sáttmálin verður undirskrivaður.

Fyri og vegna Almannaverkið:

Dagfesting:

Undirskrift 18/10/22

Fyri og vegna veitaran:

Dagfesting: 10-10-22

Undirskrift

Fyri og vegna Gjaldstovuna:

Dagfesting: 17. okt '22

Undirskrift